# Leiðari til kalvaalingina hjá P/F Fiskaaling

Av tí at leiðarin fyri kalvaalingina er farin í annað starv, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv leyst at søkja á P/F Fiskaaling.

Viðkomandi, ið settur verður, kemur at hava dagligu ábyrgdina av at menna kalvaalingina í felagnum, og skal skipa og leggja hetta til rættis soleiðis at arbeiðið verður framt undir tryggum og skipaðum umstøðum.

Í sambandi við at felagið nú er farið undir eina verkætlan sum hevur sum endamál at menna kalvaaling í Føroyum byggir felagið í løtuni eina støð til hetta endamál. Men hóast henda støð í fyrstu atløgu er ætlað til kalva verða her eisini skaptir møguleikar fyri at fara undir menning av øðrum fiska- og djórasløgum. Tann, ið settur verður í starv, fær tí eisini, saman við stjóra felagsins, ábyrgdina av at menna aling av øðrum fiska- og djórasløgum sum felagið møguliga fer undir komandi árini.

Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða í einum mennandi arbeiðsumhvørvi saman við góðum starvsfeløgum og fær møguleikar at menna seg víðari, við at luttaka á ymsum skeiðum uttanlanda.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum, at tann sum settur verður, hevur útbúgving frá hægri lærustovni og hevur holla viðkomandi vitan, sum ger hann vælskikkaðan til starv av hesum slag. Umsøkjarar, sum umframt at hava hollan ástøðiligan kunnleika, eisini hava praktiskar royndir innan alivinnuna, hava fyrimun.

Hevur tú hug til stórar avbjóðingar, eitt ábyrgdarfult, viðkomandi og mennandi starv innan føroysku alivinnuna, kunnu vit bjoða tær alt hetta, umframt góðar arbeiðsumstøður og møguleika at menna teg víðari.

Ynskiligt er at starvið verður sett skjótast gjørligt, men hinvegin hava vit eisini tíð at bíða eftir rætta viðkomandi, um so er at umstøður gera, at viðkomandi ikki er tøkur beinanvegin. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast P/F Fiskaaling, Við Áir, FO 430 Hvalvík, í seinasta lagi 1. juli 2000. Vilja tygum hava nærri upplýsingar um starvið, kunnu tygum seta tygum í samband við P/F Fiskaaling, Símun Joensen, stjóra, telefon 474747 ella 214747.

Við Áir 13.6.2000

**P/F Fiskaaling**

## Lýsing av P/f Fiskaaling

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Felagnum er álagt at standa fyri tí føroyska kynbótaarbeiðnum við laksi og sílum. Endamálið við kynbótaarbeiðnum, er at ala fram ein frískan fisk, sum hevur best møguligar eginleikar, soleiðis at føroyska alivinnan er betur kappingarfør á altjóða marknaðinum. Kynbótaarbeiðið byrjaði í 1991 og er seinastu árini ment, soleiðis at í dag verður valt út fyri allar eginleikar, sum til ber at hava við í kynbótaarbeiði við laksi. Fyrstu 5 árini hava 150 familjur verið tiknar við í kynbótaarbeiðnum, men frá 1999 at rokna er støðin víðari útbygd, soleiðis at til ber at hava 400 familjur við í úrvalinum. Eftir seinastu útbyggingina er føroyska kynbótaarbeiðið fult á hædd við kynbótaarbeiðið, sum verður gjørt í øðrum londum. Umframt at standa fyri kynbótaarbeiðnum er felagnum eisini álagt at menna nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Í hesum sambandi hevur felagið seinastu árini arbeitt við eini verkætlan innan aling av toski. Hendan er nú steðgað og felagið er farið í holt við eina verkætlan, sum hevur til endamáls at menna alingina av kalva. Sum liður í kynbótaarbeiðnum framleiðir felagið hartil 2000-3000 litur av laksarognum árliga umframt nakað av sílarognum. Samlaði umsetningurin í felagnum seinastu árini hevur verið umleið 25 mill. kr.

## Skrivari søkist

Landsfelag Føroyinga í Útbúgving, søkir hervið eftir einum skrivara at taka sær av skrivstovu uppgávum felagsins. Starvið er 10 tímar um vikuna, og starvstíðin verður fyribils sett til 1 ár fram. Arbeiðstíðin verður týsdag, hósdag og fríggjadag kl. 15.00-18.00.

**Skrivstovuuppgávurnar fevna seg um:**
Vanligt skrivstovuarbeiði, útskriving av LFÚ-kortum, skrivari á stjórnar- og aðalfundum, o.a. fyrifallandi arbeiði.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi starv í einum mennandi umhvørvi, sum viðvíkur ungum lesandi í Føroyum. Eitt starv saman við ungum fólki frá 19-27 ár, ið vilja virka fyri at útbúgvingarumstøðurnar hjá teimum lesandi í Føroyum alsamt gerast betur og betur.

Vit vænta at tú ert fyrikomandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Royndir innan skrivstovuarbeiði er sjálvandi ein fyrimunur, umframt at tú skalt vera før/ur fyri at nýta tekstviðgerðar forrit (serliga Microsoft Word). Eisini er ynskiligt, um tú hevur áhuga at arbeiða innan fakfelagsarbeiði.

**Starvið verður lønt eftir nærri avtalu.**

Umsóknarfreistin er úti 20. juli 2000, og verður starvið sett frá 1. august 2000.

Um hettar ljóðar sum nakað fyri teg, so send eina umsókn, umframt møgulig prógv og ummæli til:

**LFÚ**
Postrúm 136
Tinghúsvegur 18, 3. hædd
FO 110 Tórshavn

Ella send i-meyl til lfu@post.olivant.fo

## Frá Norðoya Javnaðarfelag

Tekning til veitsluna leygarkvøldið 17. juni fer fram á hesum tlf. nr. 456411, 455602, 455247 og 455282.

Kostnaður 150 kr.

Seinasta freist: Fríggjadagin 16. juni kl. 18.

## Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hetta tín áhuga, so ring ella skriva til:

P/f Frants Restorff
Tórsgøta 13
Postsmoga 41
100-Tórshavn
Tel. 31 10 60

frants restorff

## Móttøka!

Í sambandi við at



**Petur Hermansen**

*tann 15. juni 2000 hevur arbeitt hjá PM í 25 ár, bjóða vit til móttøku í heilsøluni við Hoyvíksvegin 74:*
***Hósdagin 15. juni 2000 frá kl. 16.00 til 18.00***

*Við heilsan*

**P/F Poul Michelsen**

## Skeinkiloyvi

Sagt verður frá, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur avgjørt at hækka talið á skeinkiloyvum í Vági við einum loyvi.

Umsóknir um skeinkiloyvið í Vági skulu vera Loyvisnevndini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. juli 2000.

**Loyvisnevndin**
Postboks 64 · Tinganes · 110 Tórshavn

## Íbúðir/kømur

Vegna 2 av lærarum skúlans verður søkt eftir íbúðum ella kømurum nærhendis ella í Havnini. Alt hevur áhuga!

Vinarliga ringið til

**Føroya Studentaskúla og HF-skeið**
Hoydaluar, FO-188 Hoyvík
Tlf. 312973



# Lýsingartorgið

**Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:**
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**Vanl. lýsingaprísur:**
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

**tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

## Akfør

**BETREKK**
Seturbetrekk til Ford Escort, árg. 96/97, sum nýggj, til sølu fyri 500 kr. Nýprísur uml. 2.000 kr.
Tlf. 315940 ella 215940

**BIL TAKBOYLAR**
sum nýggir, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 319190

**BUSSUR TIL SØLU**
VW Transporter 1900 diesel, árg. 1992, koyrt 155.000 km.
Tlf. 445110 aftaná kl. 17

**CAMPINGVOGN SÆLGES**
Dethlefs 530 TK, 5/6 soveplads, toilet, køkken, soveafdeling, varme, varmt vand, nyere model, vægt ca. 1100 kg. l: 5,5 mtr.
Tlf. 221910, 421255, 318877

**DAIWOOD LAGANZA 2.0**
Vegna keyp av arbeiðsbili, er ein 13 mðr. gamal Laganza (svartur) bíliga til sølu. Bilurin hevur CD-spælara, aircon., sportsfelgur, bert koyrt 4950 km.
Tlf. 213060

**CITROEN 3X19 TRS**
st.car. til sølu fyri 30.000,- kr., koyrt 157.000 km, í besta standi.
Tlf. 311973 ella 314107

**CITROËN BX 19 TRS**
Gráur stationcar, árg. 86, bíliga til sølu.
Tlf. 443189

**CITROEN BX16**
árg. 11/92, sýnaður og rustviðgjørdur okt. 99.
Tlf. 212174

**FELGUR KEYPAST**
4 stk. 13" felgur til Mazda 323 keypast.
Tlf. 319250

**FELGUR R13**
4 felgur, sum passa til m.a. Datsun, bíliga til sølu (500 kr.)
Ringið 215698

**FIAT UNO**
Fiat Uno 70-SL árg. 89 til sølu.
Tlf. 212475, Brestir

**FORD COURIER**
1.6 vøruvognur, diesel, í góðum standi, til sølu fyri 50.000 kr.
Tlf. 328018

**FORD FIESTA**
árg. 87, til sølu fyri 5.000 kr. Píkadekk fylgja við.
Tlf. 319529, e. kl. 19

**FORD ORION**
til sølu fyri einans 11.000 kr. Sær gott út.
Tlf. 423080

**SUMMARDEKK**
4 summardekk á Toyota felgu. Pirelly 175 R 13, til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 310833

**FORD SCORPIO 2.9i CHIA**
til sølu sum eykalutur, hevur ongan motor.
Tlf. 313267 ella 213267

**FORD SIERRA**
árg. 87, koyrir væl, nýggj dekk, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 214321

**GÁVUBRÆV TIL SØLU**
4 Good Year dekk til persónbil. Gávubræv frá Super Dekk Service. Tú sleppur sjálv/ur at velja hvørji dekk tú vil hava. Einasta treyt: Dekkini skulu vera til persónbil. Verður latið hægstbjóðandi.
Tlf. 314624

**HONDA ACCORD**
til sølu, árg. 86, hevur powerstýring, el-rútar, centrallás. Er í góðum standi.
Tlf. 282499

**HONDA CB 500**
sport, árg. 9/99 58 HK, hevur koyrt 1800 km til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 212525 ella 221232

**ISUZU**
midi vøruvognur til sølu sum eykalutur.
Tlf. 314765

**MANGLA TYGUM**
ein góðan og sera vælhildnan bil, so hygg her. Bilurin er ein Toyota Corolla, árg. 93, reyður og sýnaður í 99. Er hetta nakað fyri teg, so ring og fá meira at vita á tlf. 282953, 443226 ella 361134

**MAZDA 323 F 1,6i TIL SØLU**
Grønur, modell v/ klapplyktum, árg. 93. Bilurin sær sera gott út og er sera økonomiskur.
Tlf. 222048

**MAZDA 626**
2.2i GLX, árg. 91, svartur, 16" Azev sportfelgur, 4 vetrardekk á felgum fylgja við. Í sera góðum standi.
Tlf. 443141, eftir kl. 17 á 281197

**MAZDA 626**
árg. 86, 4 hurðar, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 319236

**MAZDA 626**
2000, í góðum standi, árg. 84, til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 447769

**MAZDA 626**
árg. 84, 2.0, í góðum standi, til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 447769

**MITSUBISHI GALANT**
sport, árg. 92, koyrt 103.000 km, til sølu.
Tlf. 373079 eftir kl. 18

**NISSAN CHERRY 1,5**
árg. 86, sýnaður í mars 2000, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 3104516

**NISSAN PATROL**
3300 Turbo, árg. 87, langa modellið, bíliga til sølu.
Tlf. 221160 ella 214444

**OPEL OMEGA**
í góðum standi, sýnaður apríl 2000, nýggj dekk, bíliga til sølu.
Tlf. 373072 aftaná kl. 19

**PEUGEOT 205 XS**
árg. 88 í góðum standi, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 314569

**SUMMARDEKK**
2 stk. Gooeyear Eagle Ventura 175/65 R14 lítið brúkt 600 kr. pr. stk. og 2 Continental 175/65 R14 200 kr. pr. stk. ella øll 4 dekk 1400 kr.
Tlf. 281434 ella 332651, Peter

**SUMMARDEKK**
Fýra brúkt, men góð summardekk á felgum til Ford Escort, til sølu.
Tlf. 315940 ella 215940

**SUMMARHÚS Í HÚSAVÍK**
til leigu. Liggja tætt við strondina. Útsýni yvir alla bygdina.
Tlf. 455565

**TIL NISSAN SUNNY II**
árg. 1986 B11. Vantar mær H. forskermur, motorhjelm, forlyktir, kúfangari, frontpanel, undir- og yvir kúfangara + kølarafiltur og h. parkeringsljós.
Tlf. 421210

**TIL SØLU**
Nýggjur kølari til Mitsubishi Lancer 1500 GLX, árg. 86, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 221060

**TIL SØLU**
Ein Datsun 2000 GLX til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 212200

**TIL SØLU**
Renault Megane RL 1.4e, 9/98, til sølu.
Tlf. 456731

**TIL SØLU**
Ein Sprite campingvognur við fortelti bíliga til sølu.
Tlf. 212200

**TIL SØLU**
Lítið brúkt summardekk, Bridgestone Potenza RE 720, koyrt 6.000 km, til sølu.
Tlf. 210664

**TIL SØLU**
Ford Escort frá 86. Bjálkin framman farin, annars góður. Kostnaður 3.000 kr.
Tlf. 314995, e. kl. 18

**TIL SØLU**
Opel Astra 1,6 GLS, árg. 94, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 333574 - 221128

**TIL SØLU**
Citroën BX 16 TRS, árg. 89, til sølu fyri 6.000 kr. Krevur ábøtur, kann eisini brúkast sum eykalutir, m.a. fylgja nýggj píkadekk við.
Tlf. 441948

**TIL SØLU**
Ein Volvo 244 6 cyl. diesel, árg. 79, bíliga til sølu.
Tlf. 447440

**TOYOTA CARINA**
árg. 1984 til sølu.
Ring 442007 eftir kl. 18

**TOYOTA CARINA II**
árg. 86, við skaða aftan, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 372090 - 212090

**TOYOTA COROLLA**
árg. 86, 4 píkadekk við í keypinum, til sølu fyri 8.000,- kr.
Tlf. 319837

**TOYOTA COROLLA 1.3**
árg. 87, selist fyri uml. 15.000,- kr. Nýtast skulu fyri uml. 6.000,- í tilfari fyri at koma gjøgnum sýn.
Tlf. 213570

**TOYOTA CROWN 2.2 D**
árg. 83 til sølu fyri 10.000 kr. Koyrir væl og er sýnaður í mars. Koblingin skal skiftast, men annars í góðum standi.
Tlf. 443173

**VOLVO 240 GL**
árg. 86, powerstýring, aut. gear, elrútar. centrallás, nýsýnaður, ongan kross. 15.000 kr.
Tlf. 220295

**VOLVO F6 LASTBILUR**
við kassa og lift til sølu.
Tlf. 218811

**VOLVO F6 LASTBILUR**
við kassa og lift til sølu.
Tlf. 218811

**VW GOLF**
1,6 turbo diesel bíliga til sølu. Bilurin hevur skaða.
Tlf. 457511

**VW PASSAT TD**
nýsýnaður, árg. 87, til sølu.
Tlf. 210246

**YMIST**
V.W. dieselmotorur 1.6 prísur 8.000 kr. og Toyota Camry motorur 2.0i 16V, prísur 2.500 kr. og 4 alufelgur 14", passa til Eudi, prísur 2.000 kr.
Tlf. 218778

**YNSKIST**
Eykalutir til eina Agria 300 sláimaskinu ynskjast.
Tlf. 441293, e. kl. 18

**TIL SØLU**
5 tons hydrauliskur rotorur, árg. 98 til grabbar o.a.
Tlf. 312779 ella 281478

**TRANSWORDK-KRANI**
2 tons, longd ca. 17 m, breidd ca. 6 m, til sølu.
Tlf. 218811

**TRANSWORK-KRANI**
2 tons til sølu, longd ca. 17 m, breidd ca. 6 m.
Tlf. 218811

## Amboð

**BOB CAT GRAVMASKINUR Á BELTUM**
1500 - 5000 kg. Nýggjar og brúktar! Kvalitetur, motorkraft & útgerð!
Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

**EL-TRUKKUR**
Lítil el-trukkur við løðara, krevur smærri umvælingar, bíliga til sølu.
Tlf. 282116

**FN-LØÐITÓL**
til el-trukk 24, 36, 48 ella 80 volt, til sølu.
Tlf. 282116

**GRAVIMASKINA**
Libra 150 S 5,2 t gravimaskina á beltum.
Tlf. 421040 ella 421251

**MASKINUR YNSKJAST TIL KEY**
Vit sóknast eftir brúktum »Tielbürger« sláimaskinum.
Tlf. 282116

**STILLADS**
Eitt stillads 75 m$^2$ bíliga til sølu, við og taka tað niður. (Træstillads).
Tlf. 321215 ella 311199

## Arbeiði

**ALT**
fyrifallandi arbeiði verður gjørt.
Tlf. 310352

**ARBEIÐI SØKIST**
Eg eri ein 21 ára gamal maður sum søkir arbeiði í summarfrítíðini.
Tlf. 317605
Spyr eftir Chris

**ARBEIÐI SØKIST**
Tveir raskir, 19 ára gamlir menn søkja eftir arbeiði í summarfrítíðini, 15. juni–15. aug. Annar er føroyingur, hin er svii. Alt hevur áhuga.
Tlf. 0046 650 21 700

**FA. HÚSAUMVÆLING: TIMBURARBEIÐI**
Alt timburarbeiði verður gjørt.
Tlf. 215214

**KIRKJURÁÐIÐ Í FUNNINGI**
Arbeiðið við at tjøra kirkjuna v.m. verður hervið boðið út. Áhugaði biðjast siga frá áðrenn 16.6. Meira fæst at vita á tlf. 423211.
Funningur 8.6.2000
Kirkjuráðið

**MÁLING AV TEKJUM**
Eg máli tekju tygara skjótt og væl. Koyri kring landið. Ring vinarliga tlf. 332005 eftir kl. 18

**TILBOÐ YNSKIST**
at skifta takið á einum húsum.
Tlf. 313156

## Barnaútgerð

**BABYLIFT**
2 babyliftir leðurlook til sølu fyri 300 og 400 kr. 1 skrástólur 100 kr.
Tlf. 448535

**BARNAÚTGERÐ TIL SØLU**
Babydýna, koddi, juniordýna, vognselar og annað.
Tlf. 444655

**BARNAVOGNUR**
Ein kombineraður barnavognur og stólur til søluyri 2000 kr. Ein 0-18 kg. barnastólur til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 448990

**BILBARNASTÓLUR**
Bilbarnastólur 0-18 kg. og ein Snugliposi til sølu.
Tlf. 444655

**GRÁUR**
Brio leðurlook barnavognur við lyft, til sølu fyri einans 1.000 kr.
Tlf. 316181 ella 343423

**TIL SØLU**
Nýggjur babysittari til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 219994

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út- & sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ .................. |

**Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi**

Sent hevur:

Navn: ..........................................................

Bústaður: ....................................................

Bygd/býur: ..................................................

Tlf.: ................

»Lýsingartorgið«
*Tíðindablaðið*
**Sosialurin**
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki